# Lærarar samráðast framvegis

*Enn er ikki stórvegis hent í samráðingunum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið*

DAGFINN OLSEN

Føroya Lærarafelag og Lønardeildin undir Fíggjarmálastýrinum samráðast framvegis. Partarnir hava víst til heimasíðuna hjá Lønardeildini, tá spurt hevur verið eftir viðmerkingum til samráðingarnar.

Og henda heimasíða, henda tænasta, sær út til at rigga væl. Har stendur soleiðis at lesa frá seinasta samráðingarfundi:

Kl 10 í dag ( tað er 17. januar, blðm.) hildu samráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið fram um nýggjan sáttmála fyri tann, sum fer úr gildi 1. mars 2000.

Á fundinum vóru krøvini frá báðum pørtum gjøgnumgingin. Fíggjarmálastýrið gjørdi viðmerkingar til broyttu uppgávurnar sambært nýggju fólkaskúlalógini. Føroya Lærarafelag gjørdi viðmerkingar til arbeiðstíðaravtaluna, sum Fíggjarmálastýrið legði fram 5. januar 2000.

Harumframt legði Fíggjarmálastýrið eisini fram uppskot til nýggja avtalu um arbeiðstíðina hjá skúlaleiðarum. Samráðingarnar halda fram. Næsti fundur ásettur at verða hósdagin 27. januar 2000, kl. 10.00



***Tilvildarliga vald mynd***

# Gongur framá við svimjihylinum

*Tað gongur rætta vegin við arbeiðinum at byggja Svimjihyl í Nólsoy. Herfyri skrivaðu vit, at allur peningurin til hylin kom frá Ovastevnunum, men tá rætt skal vera rætt, so kom rættiliga fitt av peningi inn við stuðulstiltøkum síðst í áttatiárunum*

DAGFINN OLSEN

Tað gongur væl við arbeiðinum at byggja svimjihylin í Nólsoy, sum Ove Joensen, sáli, lovaði børnunum í bygdini.

Herfyri skrivaði vit, at peningur til byggingina kom frá Ovastevnunum. Tað er tó rætt, men fall tó nøkrum av teimum, ið skipaðu fyri stuðulstiltøkum síðst í áttatiárunum, fyri bróstið.

Vert er at nevna, at sera stórur partur av peninginum til svimjihylin í Nólsoy er fingin til vega við stuðulstiltøkum, sum m.a. Birgir og Joannes Andreassen skipaðu fyri síðst í áttatiárunum. Teir mannaðu nevndina tá.

Talan er um eini 2 milliónir.

**Ovastevnan**

Ein av limunum í núverandi nevnd fyri svimjihylin, Hilmar Joensen, sigur, at hann kennir ikki neyvu tølini, men Ovastavnan gevur millum 50. 000 og 100.000 krónur hvørt ár.

Í fjør gav hon meira enn nakrantíð, eini 80-90.000 krónur.

Hann sigur, at stuðulstiltøkini í áttatiárunum góvu millum 1,5 og 2 milliónir. Ovastevnan hevur verið í eini 5 ár og hevur givið eini 300.000 krónur.

**Afturvendandi**

Hilmar Joensen sigur, at hóast kommunan yvirtekur raksturin, tá svimjihylurin er liðugur, so dettur ovastevnan ikki niðurfyri.

– Ætlanin er, at hon skal vera afturvendandi tiltak og geva íkast til raksturin, sigur Hilmar, tí tað kann vera tungt hjá lítlari kommunu at reka svimjihyl.

Hilmar sigur, at longu í upplegginum til arkitektarnar var lagt soleiðis tilrættis, at bygging og rakstur gjørdust so ódyr, sum gjørligt.

Tilfarið inni er næstan viðlíkahalds frítt. Hylurin er 6 metrar breiður og 16 langur. Hann er ikki so djúpur, tí dýrt er at halda hann heitan.

Ætlananin er at hava eitt el-teppi at breiða yvir hylin, fyri at halda hann heitan, tá hann ikki er í nýtslu.



*Tað gongur væl við arbeiðinum at byggja svimjihyl í Nólsoy. Longu frá byrjan var dentur lagdur á at halda bygging og rakstur á so lágum kostnaðarstøði, sum møguligt*

*Stórur partur av peninginum, sum svimjihylurin í Nólsoy verður bygdur fyri, stavar frá stuðulstiltøkum, ið vóru síðst í áttatiárunum, so ynskini um svimjihyl í heimbygdini hjá Ova Joensen, sála, kundu gerast veruleiki* **(savnsmynd)**




## Tíðindablað

Limablaðið fyri veturin 1999, ið Samfundet Sverige–Färöerna gevur út, er komið.

Í blaðnum eru hugleiðingar, ferðafrásagnir og tíðindi til limir.Ymiskt kunnandi tilfar er til limirnar.

M.a. verður trivið í kanning um kyksilvur, sum er gjørd í Føroyum fyri nøkrum árum síðani. Kanningin hevur vakt ans úti í heimi. Føroyskar kvinnur verða ráddar til at lata vera við at eta grind/spik og kanningarúrslitini hava m.a. ført við sær, at markið fyri, havt týskir myndugleikar loyva av kyksilvuri á náttúruni, er lækkað. Eisinii amerikanskir myndugleikar taka kanningina í álvara, men fyri at taka avgerðir um tað teir sjálvir lata út av eituri, krevst neyv trygd um kanningarúrslitini, skrivar Tíðindablaðið m.a..


TÍÐINDA BLAÐIÐ

Sälkvinnan eller Sälars längtan

Styrelsen önskar alla medlemmar ETT RIKTIGT GOTT NYTT ÅR!



# Vilja hava optión við

*Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vilja hava almenna optión við í útbjóðingarlóg. Javnfl. vil eisini hava oljuútgerðarhavn í Suðuroy við*

JAN MÜLLER

Tá Vinnunevndin týsdagin í næstu viku fer at leggja álit fram í málinum um útbjóðing til oljuleiting á landgrunninum verða tvey broytingaruppskot løgd fyri tingið. Annað er frá Javnaðarflokkinum, sum skjýtur upp at seta eina nýggja grein í sjálvt standardloyvi, ið áleggur oljufeløgunum at brúka Suðuroynna til útgerðarhavn. Hitt uppskotið er frá javnaðarflokkinum og sambandsflokkinum, sum skjóta upp at fáa eina nýggja grein við í sjálva lógina um eina almenna optión. Tvs. at ístaðin fyri at koma við einum landsoljufelag beinanvegin, so tryggjar tað almenna sær rætt til so og so nógv % í øllum fundum.

Heine O Heinesen, formaður í Vinnunevndini sigur, at allir flokkarnir annars eru samdir um innihaldið í sjálvum lógaruppskotinum til 1. útbjóðing. Hann ivast annars í, um broytingaruppskotini fara at fáa meiriluta í tinginum.

Henrik Old, umboð javnaðarfloksins í Vinnunevndini sigur seg vera nøgdan við uppskotið til 1. útbjóðing, men hann heldur neyðugt er við onkrum í-skoytum.

Sjálvur metir hann tað vera sera umráðandi at fáa við í standardloyvini, ið skulu latast oljufeløgum, sum skulu bora eftir olju, at tey skulu brúka eina havn í Suðuroynni til útgerðarhavn. -Hóast virksemi kanska verður avmarkað í leitingartíðini, so hevur tað eftir okkara meting sera stóran týdning fyri framtíðar virksemi, hvar byrjað verður. Vit vita av royndum, at verður t.d. virksemi savnað í t.d. miðsteðarøkinum, so verður ringt seinni at broyta hetta. Tí skjóta vit upp at seta í standardloyvini, at oljuútgerðarhavnin skal liggja í Suðuroynni.

Tingmaðurin sigur, at tað er ikki so avgerandi, hvat í Suðuroynni útgerðarhavnin liggur. Her eru møguleikar bæði á Drelnesi og í Vági. Hann vísir á, at kommunan í Vági hevur longu tøkt eitt stórt øki til komandi oljuvirksemi, eins og kommunan á Tvøroyri hevur peikað á Drelnes.

Uppá fyrispurning um hann væntar, at uppskotið fer at vinna frama í tinginum, nú fleiri tingmenn hava sagt seg vera ímóti at fáa við í lógina, hvar útgerðarhavnin skal liggja, sigur Henrik Old, at góður møguleiki skuldi verið fyri at fingið hetta samtykt. Verður tað kortini felt, so metir tingmaðurin ikki, at nakað mistak er gjørt. Tí tá stendur framvegis opið, hvar útgerðarhavnin skal vera.

Hitt broytingaruppskotið, sum sambands- og javnaðarumboðið í Vinnunevndini leggja fram í felag, snýr seg um at fáa eina optión við í lógina. Tvs. at ein grein skal tryggja, at landið skal eiga lut í øllum framtíðar fundum. Higartil hevur verið nevnt, at parturin hjá landskassanum skal vera kanska 5%, men er vilja uppskotstillararnir heldur leggja seg millum 1 og 5%. Henrik Old sigur, at tað kanska er rættari at leggja seg eftir einum lægri prosenti, tí tá slepst helst undan at gera aðrar justeringar í oljuskattinum annars. Umboð fyri føroysku oljumyndugleikarnar hava nevniliga ávara ímóti at pilka ov nógv við treytirnar, ið settar verða oljufeløgunum. Tí verður t.d. ein optión uppá 5% tikin við, so verður neyðugt at lækka krøvini onkra aðrastaðni.

Tað sær tí ikki mætari út enn, at umboðini í Vinnunevndini, sum vilja hava optiónina við, halda tað vera í lagi at spæla út við einum heilt lágum prosentsatsi fyri harvið at sleppa undan at avlaga restina av oljuskattaskipanini.

Nú um dagarnar vóru umboð fyri Oljumálastýrið á fundi í Vinnunevndini, har tey greiddu frá avleiðingunum, um t.d. ein optión uppá 5% verður tikin við í lógina.



*Landsstýrismaður í oljumálum á fundi í Vinnunnevndini.*

# Oljufeløg fyrireika seg til leiting

JAN MÜLLER

Hóast løgtingið enn ikki hevur givið endaligt grønt ljós fyri oljuleiting við Føroyar, so eru fleiri av oljufeløgunum farin at fyrireika seg. Eitt av hesum feløgum er Texaco, sum í fleiri ár hevur gjørt ymsar forkanningar á føroyskum øki saman við tveimum øðrum oljufeløgum, Conoco og Murphy. Umboð fyri Texaco hava júst verið í Føroyum á sokallaðari „factfinding-mission“ tvs. hava havt samband við fyritøkur, stovnar og einstaklingar, sum kunnu fáa týdning fyri teirra virksemi, tá og um felagið verður millum teirra, sum fær leitingarloyvi í Føroyum.

Donal O´Driscoll stendur á odda fyri arbeiðinum hjá „Texaco Faroe Group“ og er hetta fimtu ferð hann er her í arbeiðsørindum. Hann sigur við Sosialin, at henda vitjanin er ein nátúrligur partur av fyrireikingini til komandi leiting, men ikki fyrr enn teir kenna allar treytir og vita um teir fáa loyvi, fara teir undir avgerandi fyrireikingar.

Hesaferð hava teir tosað við fólk frá Oljufyrisitingini umframt umboð fyri vinnulív og aðrar almennar stovnar. Tað er einki dulsmál, at eisini Texaco-bólkurin longu nú hevur eyguni eftir hølum til skrivstovu. Tað er nevniliga treyt fyri at vera við í leitingini, at oljufeløg skulu hava skrivstovu í Føroyum.

Spurningurin um logistikk tvs. flutning, útgerðarhavnir ol. hevur eisini stóran prioritet hjá oljufeløgunum sohvørt tað nærkast einum leitiskeiði.

Tað vísir seg, at tey oljufeløg blaðið hevur tosað við, eru sera varin við ikki at leggja seg út í tjakið í Føroyum um, hvar ein oljuútgerðarhavn skal liggja. Hinvegin er eisini greitt, at oljufeløgini noyðast at vísa hesum málinum ans longu nú fyri at vera klár, tá leitingin byrjar av álvara.

Sosialurin skilur, at umboð fyri Texaco hava vitjað fleiri pláss í Føroyum fyri at kunna seg við umstøðurnar. Tey meta talan er um fýra pláss, sum kunnu koma uppá tal til útgerðarstøð, nevniliga Runavík, Sund, Tórshavn og so Suðuroyggin.

**Neyvan Gullblokkar til øll**

Sum støðan er í løtuni er torført at fáa umboð fyri oljufeløgini at úttala seg um komandi leiting við Føroyar og møguleikarnar at finna olju ella gass.

Men sum skilst eru feløgini rættiliga væl nøgd við økið, sum Oljufyrisitingin hevur peikað út til 1. útbjóðing. Seismikkurin vísir, at talan er um áhugaverd øki, sum kunnu goyma nógva olju og møguliga eisini gass. Men mest áhugaverda økið, sum er við í útbjóðingini og sum er nærhendis verandi oljukeldum bretsku megin markið, er avmarkað, soleiðis at øll feløgini ella bólkarnir fáa neyvan lut í teimum bestu blokkunum, teimum sokallaðu „Gullblokkunum“, sum teir eisini verða nevndir.

Sosialurin skilur á oljufeløgum, at kappingin um gullblokkarnar fer at verða sera hørð. Tey feløg ella teir helst fáu bólkar, sum fáa lut í hesum blokkum, fara uttan iva at bjóða fram sera kostnaðarmikil arbeiðsprogram, har tey koma at binda seg til at bora fleiri brunnar eftir lutvíst stuttari tíð.

Hinvegin kann roknast við, at tað verða feløg ella bólkar, sum ikki fáa lut í „gullblokkunum“, ið ikki halda aðrar blokkar verða nóg áhugaverdar til at binda seg til at bora nógvar brunnar. Tað kann tí henda, at talið á feløgum ella bólkum, sum fara at binda seg til at bora nógvar brunnar verður avmarkað.

Umboð fyri okkurt oljufelag blaðið hevur tosað við ávarar føroyingar ímóti at vera ov bjartskygdar. Enn er eingin olja funnin. Metingarnar siga eisini, at tað er kanska „bert“ 25% møguleiki fyri at raka við olju. Men er eydnan við feløgunum og tey raka við olju kanska longu 1. árið ella stutt eftir tað, so kann áhugin fyri Føroyaøkinum fara at vaksa munandi, soleiðis at mong av teimum oljufeløgunum, sum ikki eru við í 1. útbjóðing, fara at leggja boð inn seinni.

Blaðið skilur, at jarðfrøðingarnir halda sera góðar umstøður vera fyri, at olja liggur í føroysku undirgrundini. Og hóast tað fyrr hevur verið sagt, at útlitini fyri elefantum ella risastórum keldum tykjast lítil í løtuni, so er tað, sum man sær á seismikkinum kortini so mikið áhugavert, at nógv oljufeløg fegin vilja vera við í leitingini. Tosað hevur verið um oljukeldur uppá 500 mill. tunnur ella á støðd við Schiehallion á bretskum øki.

Hóast tað er vágamikið og kostnaðarmikið at bora á djúpum vatni við Føroyar, so koma royndirnar frá bretskari síðu sera væl við, tá farast skal undir eina framleiðslu. Foinavenfeltið, sum var tað fyrsta at fara undir framleiðslu á bretskum øki, er í dag sera dýrt at reka orsakað av byrjunartrupulleikum.

Spurningurin at fáa til vega hóskandi boripallar at bora á djúpum vatni við Føroyar kann koma at gerast ein trupulleiki, serstakliga um loyvini ikki verða latin fyrr enn seint komandi vetur. Sera fáir pallar finnast, sum kunnu bora um okkara leiðir, og er ætlanin at byrja boringina í ár 2001, so krevst, at tíðarætlanin hjá føroysku myndugleikunum ikki verður ov nógv broytt. Umframt at fáa til vega boripallar, so skulu feløgini eisini leggja til rættis arbeiðsprogrammini, og hetta tekur tíð.

Hjá Texaco-bólkinum t.d. hava teir sett sær fyri at bora fyrsta brunnin ikki ov seint í ár 2001.

